# a lívið í Klaksvík

## Eitt kraft-sentur

Henda stóra ætlanin er gjørd í tøttum samstarvi við t.d. Klaksvíkar kommunu.

Ein slíkur handilsdepil hevur verið frammi áður, men nú er líkt til, at hann umsíðir gerst veruleiki.

– Í dag er veðrið gott uttandura, og er eisini gott í hjørtum okkara. Eg vænti avgjørt, at hesin handilsdepilin fer at verða til miklan heiður fyri Klaksvík.

– Ja, eg vænti faktiskt, at hesin fer at gerast eitt kraftsentur aftrat í okkara býi, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.




*Í fleiri ár hevur ein stór grótrúgva ligið køld og myrk innast í Klaksvíkini. Nú verður hetta økið umskapað til ein depil, sum skal hýsa bæði handlum, skrivstovum, torgi, høll og øðrum virksemi*

# Savningardepil og magnet

Hóast talan er um ein handilsdepil, verður tað kortini MargHøllin og tað stóra Torgið sum koma at virka sum ein savningardepil – ella magnet – fyri fólk.

Á hesum støðum skulu verða møguleikar fyri alskyns sløgum av tiltøkum, so sum konsertir, ráðstevnur, framsýningar, partar av tiltøkunum í samband við Norðoyastevnuna, Sjómannadagin og annað.

Í Marghøllini verður somuleiðis møguleiki at skipa fyri fótbóltskappingum, talvolympiadum, innandura rógvikappingum, sølustevnum, ráðstevnum og mongum øðrum tiltøkum.

Endamálið er at draga klaksvíkingar inn í henda stóra depilin, og soleiðis fáa allir partar gagn og gleði av hesum.

– Vit eru sannførdir um, at Klaksvíkin hevur brúk fyri einum slíkum handilsdepli.

– Tí vóna vit bara, at fólk fara at taka væl ímóti hesum – eisini aðrastaðni frá, sigur Óli Marner.

## FAKTA

**Handilsdepil í Klaksvík**

Íalt verður Handilsdepilin 14.500 fermetrar til støddar.
Av hesum verða 6.500 handlar og torg
2000 fermetrar parkeringskjallari
2000 fermetrar MargHøll
4000 fermetrar skrivstovur, handlar og annað
Kostnaður um 130 mió. kr.
Byrjast skal beinanvegin, soleiðis at øll ætlanin kann standa liðug í november mánaði 2007

Hinvegin so vísti hann á, at Handilsdepilin ikki fer at verða orsøk til at handlar doyggja út. Roknað verður nevniliga við, at fólk fara at koma aðrastaðni frá at keypa í Klaksvík, nú koyrandi er um Leirvíksfjørð.

### Við báti og bili

Eitt er so handilsdepilin, MargHøllin og Torgið. Uttandura verður eisini gjørt alt fyri, at pláss skal verða fyri teim vitjandi – og so er líkamikið um tey koma við báti, bili ella til gongu.

Rundan um Handilsdepilin er ætlanin at gera bátabrúgvar, soleiðis at fólk kunnu koma til býin sjóvegis og lata bátar sínar liggja trygt í miðbýnum.

Nógv parkeringspláss skulu haraftrat útvegast, bæði inni í deplinum, men eisini uttandura. Ein 2000 fermetrar stórur parkeringskjallari skal gerast, umframt tað at møguleikar verða at seta bilin frá sær uttanfyri.

Ætlanin er somuleiðis at tey vitjandi skulu kunna ganga av Biskopstø og yvir í Handilsdepilin. Umhugsað er, at gera ein langa gongubrúgv yvir í depilin, men spurningurin er kortini um henda verður gjørd beinanvegin.



*Tær eru allar savnaðar saman til myndatøkuna – við eigaranum, Jórun Mørkøre fremst: Vinstrumegin: Mariann Poulsen, Anita Svøðstein, Sólgerð Thomsen, Gunvør Hansen, Irena Eysturdal, Judith Funch, Jeanette Sørensen, Vivian Viðbjørg og Malan Mortensen. Á myndini vantar Anna Kristina Samson*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Klingran fekk góða byrjan

**Klaksvík:** Í gjár fingu køkuhugaðir klaksvíkingar á fyrsta sinni høvið at síggja og smakka úrvalið av vørunum í nýggja bakarí'inum hjá Jórun Mørkøre, Klingruni.

Í samband við sína upplating var høvið hjá almenninginum at vitja hetta snotuliga og ljósa staðið beint við tunnilsvegin. Og rættiliga nógv gjørdu eisini brúk av hesum møguleikanum.

Klingran gjørdist samstundis karmur um framløgu av teirri spennandi handilsligu kollveltingini í Klaksvík, tá ætlanin við miðbýinum varð avdúkað á stórari samkomu á hesum staði.

**sb.**



*Nógv fólk vitjaðu inn á gólvið seinnapartin í gjár, tá bakaríið hjá Jóruni lat alment upp*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Café í KFUM&K

**Klaksvík:** Leygarkvøldið fer KFUM&K at skipa fyri eini café, sum er ætlað øllum fólkum í øllum aldursbólkum.

Á skránni hetta kvøldið verður livandi tónleikur, góður matur og andakt.

Byrjað verður kl. 22 og er ætlanin at halda á til væl út á náttina.

**sb.**

# Opið hús í bygdarhúsinum

**Leirvík:** Hóast flestu tiltøkini í samband við upplatingina fara fram í Klaksvík, verður ikki heilt einki gjørt burturúr hinumegin tunnilin.

Eftir at snórurin er kliptur og hábærsliga bilafylgið við løgmanni á odda fer gjøgnum tunnilin, verður bygdarhúsið í Leirvík opið.

Her verður høvið hjá fólki at koma saman, og hitta m.a. løgmann og aðrar av almennu gestunum.

Á hesum staði verður somuleiðis ein stórskýggi settur upp, har møguleiki er at fylgja hátíðarhaldinum. Afturvið fær fólkið góða høvdasuppu úr Leirvík og annað, eins og tónleikur verður á skránni. Sagt verður, at øll eru vælkomin inn á gólvið – bæði leirvíkingar og gestir.

Annars kann verða nevnt at Bátasavnið er opið frá kl. 15 til 20 og at Bowlinghøllin somuleiðis er opin allan dagin.

**sb.**